Búskapur og vinna:
## Skulu fáa skil á

ES-myndugleikarnir krevja nú, at norska stjórnin skal fáa bilbukt við russiskum fiski, sum verður útfluttur til ES-marknaðin sum norskur fiskur. Tað fekk norski fíggjarmálaráðharrin, Per-Kristian Foss, at vita, tá hann var í Bruxelles í síðstu viku.

Norski ráðharri royndi at verja seg við, at tað er trupult at hava eftirlit við, hvaðani fiskurin upprunaliga kemur, men at lovaði at gera nakað við málið. Ráðharrin umbar seg eisini við, at tað tekur tíð at avgreiða slík mál, m. a. tí fleiri teirra enda í rættinum.

## Eftir SAS

Farmadeildin hjá týska flogfelagnum Lufthansa boðaði um vikuskiftið frá, at tað ætlar sær at yvirtaka millum 40 og 49 prosent av SAS Cargo. SAS og Lufthansa arbeiða frammanundan saman í Star Alliance, sum eisini umfatar United Airlines og Austrian Airlines, men á farmaleiðunum arbeiðir SAS saman við Lufthansa og Singapore Airlines.

Stjórin í SAS, Jørgen Lindegaard, hevur fyrr sagt, at SAS ætlar at arbeiða sjálvsstøðugt, men at hendan hugsjónin ikki er bindandi kortini.

## Gassmarknaður

Nýtslan av gassi veksur skjótt í ES-londunum, og nú hevur norska oljufelagið Statoil gjørt av at lata upp ein serligan gassmarknað í Berlin. Statoil er tó ikki einsamalt um vekætlanina, men samstarvar við tær báðar týsku fyritøkurnar Ruhrgas og BEB.

Árliga koma umleið 45 milliardir rúmmetrar av gassi til gassmiðstøðina í Emden. Meginparturin kemur úr Noregi, men nakað kemur eisini úr Hollandi, Bretlandi og Russlandi.

Frammanundan er ein gassmarknaður í belgiska býnum Zeebrúgge.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Sveits fer upp í ST



*Nakrir av ráðharrunum í sveitsisku stjórnini fegnast um úrslitið av fólkaatkvøðuni sunnudagin. Stjórnin og meirilutin í tjóðartinginum høvdu mælt fólki til atatkvøða fyri ST-limaskapi*
*Mynd: Reuters*

**Við einum lítlum, men kortini greiðum meiriluta hevur sveitsiska fólkið gjørt av, at landið skal fara upp í ST sum limaland nummar 190. Nú er bara Vatikanið uttanfyri**

SVEITS
*Árni Joensen*

Sveitsiska umsóknin um limaskap varð send ST-høvuðsborgini í New York longu í gjár, tí umsóknin var longu skrivað undan fólkaatkvøðuni sunnudagin. Umsóknin skal nú hava ta vanligu viðgerðina, og í september verður sveitsiski limaskapurin ætlandi veruleiki. Landið verður tá limur nummar 190 í heimsfelagsskapinum, og tá er tað bara Vatikanið, sum ikki er limur í ST.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, var skjótur at ynskja sveitsiska fólkinum tillukku við avgerðini, sum hann segði vera eitt tekin um, at fólkið hevur álit á tí arbeiði, sum felagsskapurin ger.

Spenningurin var stórur undan fólkaatkvøðuni. Tá uppteljingin var liðug sunnukvøldið, høvdu 54,6 prosent atkvøtt fyri ST-limaskapi, meðan 45,4 prosent høvdu atkvøtt ímóti. Verður hugt at úrslitinum í teimum einstøku kantonunum ella landspørtunum, var meiriluti fyri limaskapi í 12 av teimum 23 kantonunum. Valluttøkan var 58 prosent, og tað er nógv eftir sveitsiskum viðurskiftum.

### Nærri ES

Úrslitið gjørdist ein sigur fyri stjórnina, meðan tann stóri taparin var tann tjóðskaparhugaði Christoph Blocher, sum stóð á odda fyri teimum, sum mæltu fólkinum frá at atkvøða fyri limaskapinum.

Teir flestu politisku flokkarnir og meirilutin í tjóðartinginum høvdu mælt fólki til at taka undir við ST-limaskapi. Tað sama høvdu partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjørt. Úrslitið vísti, at tað vóru serliga fólk í býunum, sum atkvøddu fyri, meðan tey flestu á bygd vóru ímóti. Í býnum Geneve, sum hýsir evropeisku ST-deildini, atkvøddu 67 prosent ja.

Politiskir eygleiðarar í Sveits siga, at úrslitið er ein týðilig ábending um, at sveitsiska fólkið kennir seg ikki so óheft av umheiminum sum fyrr, og kreppan hjá flogfelagnum Swissair hevur eisini víst nógvum sveitsarum, at landið kann ikki halda seg óheft av tí, sum hendir aðrastaðni.

Summir eygleiðarar spyrja, um úrslitið sunnudagin kann fara at bera í sær, at Sveits fer at nærkast ES. Umsóknin um sveitsiskan limaskap liggur í einari skuffu í Bruxelles, men nú halda summir eygleiðarar, at umsóknin skjótt verður tikin upp úr skuffuni.

# Kjarnorkubumbuhóttan ímóti New York

**Ein mánað eftir yvirgangsatsóknirnar í USA tann 11. september fingu amerikansku myndugleikarnir frænir av, at yvirgangsmenn ætlaðu at smugla eina kjarnorkubumbu til New York.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Tíðindini stóðu í mánaðarblaðnum Time, sum kom út í gjár. Sambært blaðnum hevði bumban eina spreingimegi, sum svarar til 10.000 tons av TNT og var stolin úr einari goymslu hjá russiska herinum.

Time skrivar, at nakrir fáir embætismenn vórðu kunnaðir um bumbuna, og avgjørt varð alt halda málið loyviligt fyri ikki at órógva fólkið í New York. Upplýsingarnar um bumbuna fingu amerikanararnir frá einari ónevndari keldu, men embætismenninir vóru ikki heilt vísir í, hvussu álítandi keldan var.

Serfrøðingar siga við Time, at hevði ein 10 kilotons bumba brostið á Manhattan, kundi hon kravt eini 100.000 mannalív, og umleið 700.000 onnur høvdu fingið skaða av teimum geiðslavirknu strálunum.

Amerikanska kjarnorkubumban, sum oyðilegði japanska býin Hiroshima í 1945, var 12,5 kilotons.

Úr Norðurlondum:
## Barnakonur heim

Í Danmark verða alt fleiri kvinnur sagdar úr starvi, tá tær greiða arbeiðsgevaranum frá, at tær eru við barn.

Ein kanning vísir, at størsta fakfelagið í Danmark, HK, hevði í fjør 71 mál, sum snúðu seg um kvinnur, sum høvdu fingið uppsagnarbræv, tí tær vóru við barn. HK sigur, at felagið hevur ongantíð havt so mong mál av hesum slagnum fyrr. Í 2000 vóru tey 52 í tali.

Løgfrøðingurin hjá HK heldur, at tað eru tey versnaðu fíggjarviðurskiftini hjá vinnuni, sum gera, at arbeiðsgevarar velja at sleppa sær av við barnakonur, tí tær fyrst skulu hava farloyvi og síðani mangan noyðast at vera heima fyri at ansa barninum, tá tað er sjúkt.

Donsku fakfeløgini bera ótta fyri, at tann nýggja skipanin, sum leingir barsilsfarloyvið úr hálvum til eitt ár fer at fáa uppaftur fleiri arbeiðsgevarar at siga barnakonum upp.

## Ikki Jens

Forsætisráðharraevnið hjá norska Arbeiðaraflokkinum, Jens Stoltenberg, fær minni og minni undirtøku millum veljararnar.

Í einari kanning hjá blaðnum Nationen sæst, at bara 11,3 prosent av norðmonnum halda, at Jens Stoltenberg hevði verið tann rætti til forsætisráðharrasessin. Hetta er 3,8 prosent minni enn í seinastu kanning, og so lítla undirtøku hevur fyrrverandi stjórnarleiðarin ongantíð havt.

Eins og í undanfarnum kanningum er tað sitandi forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, sum er best umtóktur. Í kanningini hjá Nationen siga 25 prosent, at hann er tann rætti. Høgraleiðarin Jan Petersen fær stuðul frá 10,2 prosentum, meðan 7,8 prosent halda, at formaðurin í Framburðsflokkinum, Carl I. Hagen, átti at sitið í stjórnarleiðarasessinum í Oslo.



# Umbyggja felagsskúlan á Oyrarbakka

**Ætlanir eru um størri um bygging og møguliga útbygging av Felagsskúlanum á Oyrarbakka. Talan er um neyðugar umvælingar, sigur stýrisformaðurin**

SKÚLABYGGING
*Edvard Joensen*



*Felagsskúlin á Oyrarbakka skal um- og útbyggjast fyri meira enn 20 milliónir krónur*
*Mynd: Edvard Joensen*

Oyrarbakka: Felagsskúlin á Oyrarbakka stendur fyri eini umvæling upp á einar 20 miliónir krónur. Talan er um neyðugar umvælingar, nú skúlin skjótt er 30 ára gamal. Tað er, sum hjá flestu skúlum í landinum, nýggja Fólkaskúlalógin, sum ger tað neyðugt við útbygging.

Tað verður ein umfatandi umbygging, farið ætlandi verður undir, sigur formaðurin fyri stýrið fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka, Sofus Johannesen, borgarstjóri við Gjógv.

Sjálv verkætlanin er ikki endaliga samtykt enn, sigur hann. Hon hevur verið viðgjørd í stýrinumog er nú send avvarðandi instansum til ummælis.

Umstøðurnar hjá lærarunum á skúlanum skulu gerast betri. Sjálv lærarstovan skal flytast, og fyrireikingarhølini hjá lærarunum skulu betrast munandi. Eisini skulu fyrisitingarhølini umbyggjast.

Flestu skúlastovurnar skulu umvælast, og nýggj høli skulu byggjast til tónleikaundirvísing og til tey handaligu fakini so sum træ- og jarnsmíð.

Rúm skal gerast til heilsusystur og aðrar vegleiðarar, sum koma á skúlan.

Lívfrøði- og alisfrøðistovurnar skulu leggjast saman, soleiðs at tær verða útjgørdar við felagsborðum eins og royndartólum og tí, sum krevst.

Miðhøllin skal gerast størri og arbeiðsligari. Har skal gerast møguligt at hava royndir og uppihaldsrúm til næmingarnar.

### Svimjihøll

Svimjihøllin stendur eisini fyri tørni. Hon skal annaðhvørt umbyggjast, ella skal heilt nýggj svimjihøll byggjast, sigur Sofus Johannesen, nevndarformaður.

Svimjihylurin í Felagsskúlanum á Oyrarbakka er sera lítil. Hann er bara 16 metrar langur, og hálvanannan metur djúpur, har hann er djúpast. Hann er tí ikki serliga væl egnaður yvirhøvur, og kann als ikki brúkast til kappingar.

– Ynskiligt hevði verið at fingið ein rættiligan hyl, sigur Sofus Johannesen, sum vísir á, at um ein kappingarhylur var á Oyrarbakka, nú bæði ítróttarhøll og fótbóltsvøllur eru á Eiði, var økið rættiliga væl fyri til at hýsa ítróttinum.

Um samtykt verður at fara undir at gera nýggjan svimjihyl, kunnu hølini, har hylurin nú er, umbyggjast til tónleika- og handaliga undirvísing. Tá fer tann um byggingin at kosta umleið eina millión. Men so fer tað at kosta væl meira at byggja nýggja svimjihøll.

Verður svimjihylurin, sum nú er, umvældur, skal nýtt byggjast til tónleik og smíð, og tað fer væntandi at kosta einar fimm milliónir tilsamans, sigur Sofus Johannesen.

– Tí er tað, at vit rokna upp á, hvørja loysn vit skulu velja, sigur hann. Tað verður væl dýrari at byggja nýggja svimjihøll, men tann samlaða loysnin verður tá betri, heldur hann.

Hann leggur tó dent á, at als eingin endalig avgerð enn er tikin um, hvussu verður við svimjihøllini.

Men umbyggingin annars fer í gongd í hesum árinum. Í grundini er hon byrjað í og við, at køkurin var ávegis umvældur í vetur. Hann verður gjørdur endaliga liðugur i summar. Øll umvælingin fer at verða gjørd í tveimum ella trimum umførum, sigur Sofus Johannesen.

Alt í alt fer umvælingin at kosta góðar 20 milliónir krónur, sigur Sofus Johannesen. Tó velst um, hvussu verður við svimjihøllini. Verður hon byrgd av nýggjum, veður tað nakað sýrari, væntar hann.

### Nýggjur sáttmáli

Avtalan, kommunurnar høvdu um Felagsskúlan, gekk út á nýggjárinum, tá nýggja skúlalógin kom í gildi.

Arbeitt hevur verið við eini nýggjari avtalu, sigur Sofus Johannesen. Hon er við at koma undir land, og fer at líkast teirri gomlu rímiliga nógv, sigur hann.

Hann sigur, at tað ætlandi skal gerast lættari hjá øðrum kommunum at koma upp í skúlasamstarvið, og at tosað er við Funnings og Elduvíkar Kommunur um samstarv. Annars eru tað somu kommunurnar, sum í dag eru í samstarvinum, sum fara at gera nýggjan sáttmála, sigur nevndarformaðurin.

Fyrsti skúlaflokkurin í Felagsskúlasamtakinum á Oyrarbakka byrjaði eftir summarfrítíðina í 1971. Tey tóku realprógv á sumri 1974. Í fyrsta flokkinum byrjaðu 27 næmingar.

Í dag ganga 118 næmingar á skúlanum. Í løtuni eru 14 lærarar á skúlanum. Av teimum arbeiða nakrir niðursetta tíð.

# Bakaríið hjá Miðberg skiftir eigara

**Bakaríið hjá Miðberg í Saltangará, skiftir eigara um hálvan mars mánaða. Tá yvirtaka nýggir eigarar bakaríið, sum kortini fer at halda fram undir sama navni**

EIGARASKIFTI
*Edvard Joensen*



*Hallgrím Miðberg, v.m., sum byrjaði bakaríið, saman við soninum Paul, sum eisini er bakari. Teir hava nú latið bakaríið á aðrar hendur, men navnið verður enn sum áður Miðberg*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Saltangará:** Bakaríið hjá Miðberg í Saltangará, skiftir eigara fyrsta dagin. Um hálvan mars yvirtaka Sofus Hansen og Rodmundur Nielsen partafelagið, sum eigur bakaríið. Bakaríið fer at halda fram undir sama navni.

Hóast teir hava keypt partafelagið, fara nýggju eigararnir onga broyting at gera ananrs, sigur annar teirra, Rodmundur Nielsen. Hann sigur, at kundarnir fara ikki at merkja, at eigaraskifti hevur verið.

Hallgrím Mkiðberg byrjaði bakaríið, og nú hann gevst at baka, er avgjørt at selja bakaríið.

Tað verður annar av nýggju eigarunum, Sofus Hansen, av Glyvrum, sum fer at reka bakaríið. Sofus er sjálvur bakari.

Rodmundur Nielsen sigur, at teir hava keypt partafelagið, men vil ikki upplýsa nakrar prís. Fíggingin er fingin til vega frá Norðoya Sparikassa, sigur hann.

Nýggju eigararnir eiga hvør sína helvt av felagnum, upplýsir Rodmundur Nielsen.

Í samband við yvirtøkuna verður almenn móttøka í bakarínum fríggjadagin 15. mars frá klokkan 15 til 18, boða nýggju eigararnir frá.